# Vandi fyri at nýggi Smyril fær somu lagnu sum Brimil ogTeistin

**Hóast nýggi Smyril kemur um tríggjar mánaðir, er semja enn ikki fingin um lønina hjá maskinmeistarunum, sum skulu sigla við**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Smyril er nú aftur í turrdokk, har hann verður málaður. Og tað er ikki eiti á dokk, tí hon er 600 metrar long og 100 metrar breið*

Nú nærkast tíðin av álvara til nýggi Smyril verður liðugur og skal setast í sigling.

Men enn er vandi fyri, at hann fær somu lagnu sum Brimil og Teistin og verður lagdur longu áðrenn hann kemur í sigling.

Orsøkin er tann, at semja enn ikki er fingin um lønina hjá maskinmeistarunum, sum skulu sigla við nýggja Smyrli.

Og fyrrenn semja er fingin ílag, kunnu maskinmeistararnir ikki fara umborð.

Júst hetta hava føroyingar ræðandi dømi um seinastu árini. Brimil lá eitt hálvt ár og gnaddaði gummi eftir at hann var liðugur tí semja fekst ikki um lønina hjá yvirmonnunum og nýggja sandoyarferjan, Teistin, lá eisini í langa tíð av somu orsøk.

Av tí at nýggi Smyril er so stórur og framkomin, skulu serligar avtalur gerast fyri hann.

Viðvíkjandi nýggja Smyrli er semja gjørd við Skipara- og navigatørfelagið gjørdir, so tað er bara Maskinmeistarafelagið eftir.

Men formaðurin í Maskinmeistarafelagnum kann ikki annað enn staðfesta, at ongin semja er fingin við fíggjarmálaráðið um um lønina hjá maskinmeistarunm, sum skulu sigla við nýggja Smyrli.

## Ongin fundur avtalaður

Jógvan Nybo sigur somuleiðis, at enn er ongin samráðingarfundur avtalaður ímillum partarnar.

Sjálvur er formaðurin í Maskinmeistarafelagnum staddur í Spania í hesum døgum, tí hann er ein av teimum, sum skulu umborð á nýggja Smyril.

– Eg komi ikki heimaftur fyrrenn í august, so eg vænti ikki, at samráðingar verða fyrrenn tá, sigur Jógvan Nybo.

Tíðarætlanin sigur, at nýggi Smyril skal verða liðugur 15. oktober, men skipasmiðjan miðjar framvegis eftir at hann skal vera liðugur 1. oktober.

Sostatt er tíðin farin at styttast av álvara.

Í oktober ganga eisini nógvir aðrir sáttmálar á almenna arbeiðsmarknaðinum, út og tá verða samráðingar ímillum fíggjarmálaráðið og øll feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum, eisini Maskinmeistarafelagið.

Spurningurin er so um sáttmálin um nýggja Smyril endar mitt í teirri orrustuni, ella um roynt verður at gera eina avtalu áðrenn.

Men í øllum førum kann staðfestast, at higartil hava samráðingarnar um lønina hjá maskinmeistarunum við nýggja Smyrli, tikið eini hálvtannað ár, uttan at semja er funnin. Annars er nýggi Smyril umfataður av vanliga sáttmálanum ímillum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið, sum gongur út 1. oktober og allir sáttmálarnir eru sagdir upp.

Og sum útlitini eru nú, har landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur boðað frá, at lønirnar skulu helst ikki hækka, eru útlit til, at samráðingarnar í heyst verða truplar.

## Gongd í málinum

Durita Tausen, sum stendur fyri samráðingunum í fíggjarmálaráðnum, sigur, at gongd er í málinum og at samband er ímillum partarnar.

Men nær næsti samráðingarfundur verður, veit hon ikki enn.

# Ístak lægsta tilboðið upp á Hovstunnilin

**Tað er nógv sum bendir á, at tað verður íslendska felagið, Ístak, sum fær arbeiðið at gera Hovstunnilin**

HOVSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fleiri vóru og lurtaðu, tá ið tilboðini upp á Hovstunnilin vórðu latin upp á skrivstovuni hjá Landsverki á miðdegi týsdagin*

Tað verður helst íslendska felagið, Ístak, sum fer við arbeiðnum at gera tunnilin ímillum Øravík og Hov.

Tað er ein niðurstøða, sum kann gerast, eftir at tilboðini, sum komu inn uppá arbeiðið, vórðu latin upp á skrivstovuni hjá Landsverki á miðdegi týsdagin.

Frammanundan hevði Landsverk bjóðað fýra góðkendum arbeiðstakarum at at lata inn tilboð og teir bjóðaðu allir uppá arbeiðið. Tað vóru 14,3 milliónir á muni á tí lægsta og tí hægsta tilboðnum og tilboðini lógu øll ímillum 126,7 milliónir og 141 milliónir.

Lægsta tilboðið hevði íslendska fyritøkan Ístak, sum bjóðaði sær at gera Hovstunnilin og tilhoyrandi vegir fyri tilsamans 126,7 milliónir krónur.

Næstlægsta tilboðið hevði Articon og Leonhard Nielsen & Sønner, sum kundu gera arbeiðið fyri 130,9 milliónir.

Næsthægsta tilboðið var beint omanfyri. Tað hevði J&K og MT Højgaard, sum kundu gera arbeiðið fyri 131,6 milliónir.

Síðani var nokk so fitt upp til dýrasta tilboðið. Tað átti Byggitek og NCC Suðuroyar Konsortiið, sum skuldu hava 141 milliónir fyri at gera Hovstunnilin og vegirnar.

Annars hevði Landsverk sjálvur mett, at arbeiðið fór at kosta 146,6 milliónir, so tilboðini eru væl lægri enn kostnaðarmetingin.

Kortini skal skoytast uppí, at afturat tilboðsprísinum koma ymsar útreiðslur afturat, eitt nú byggileiðsla, eftirlit, jarðarkeyp og annað og Landsverk fer nú at gera eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina útfrá tilboðnum.

Annars hevur Løgtingið samtykt, at tað kunnu brúkast upp til 150 milliónir til endamálið.

## Tilboðini roknast út

Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, sigur, at nú verða tilboðini gjøgnumgingin. Eitt, sum hugt verður eftir, er, um tilboðsgevararnir hava nøkur fyrivarni í teirra tilboðum og um, hvat hesi fyrivarni í so fall fara at kosta.

Hann sigur, at síðani verður alt talt saman og drigið frá og so verða samráðingar við lægsta tilboðsgevaran um at gera ein sáttmála um arbeiðið.

Og tað er eisini greitt, at tað skal arbeiðast skjótt, tí eftir ætlan skal sjálvt tunnilsarbeiðið byrja longu í heyst og tað skal vera koyrandi í 2007.

Tilsamans fevnir verkætlanin um 2437 metrar av tunli og 2240 metrar av vegi øravíkarmegin og Hovsmegin. Serliga Øravíkarmegin skal nógvur vegur gerast, tí har er talan um at gera 1790 metrar av vegi úr Øravík í Tjaldavík, har tunnilin byrjar.

Tunnilin verður 9,5 m breiður í neðra og koyribreytin verður sjey metrar.